# Próvtøkur

Næmingar við avbjóðingum

# Próvtøkukunngerðin

- **§ 21.** Skúlastjórin skal bjóða próvtakara, ið hevur skerdan virkisførleika, serligar próvtøkutreytir fyri at javnstilla hann við aðrar próvtakarar í próvtøkustøðuni. Tað er ein fortreyt, at tilboðið ikki hevur við sær, at próvtøkustøðið lækkar.

  *Stk. 2.* Skúlastjórin tekur avgerð um hetta eftir tilmæli frá Sernámi ella øðrum serkønum  við sernámsfrøðiligum innliti og í samráð við næmingin, tey, ið hava foreldramyndugleikan, og Mentamálaráðið.

# Fylgiskjal 1

**Serlig fyriskipað próvtøka**

- a) Skúlastjórin skal bjóða næmingi, sum hevur skerdan virkisførleika, eina serliga fyriskipaða próvtøku.
- b) Fyriskipanin kann fevna um próvtøkuhættir og karmar fyri próvtøkuna, m.a. at nýta serligar hjálparmiðlar, eyka tíð og ella øðrvísi uppgávur.
- c) Hóast serligar fyriskipanir verður hildið fast við endamálið við próvtøkuni og at fakliga støðið ikki verður broytt. Um ein partur av próvtøkutilfarinum skal tillagast, skal annað koma í staðin, sum lýkur sama mál og støði.
- d) Ítøkiligari meting verður gjørd í hvørjum einstøkum føri,
- e) Próvtøkan verður fyriskipað eftir somu treytum, sum undirvísingin hevur verið løgd til rættis eftir, og skal endurspegla undirvísingartilgongdina hjá næminginum.

# 2. Mannagongdir

- a) Flokslærarin metir í samráð við hinar lærararnar, um næmingur hevur tørv á serligari fyriskipan í einari ella fleiri próvtøkulærugreinum. Tey, sum hava foreldramyndugleikan og næmingurin verða kunnað um niðurstøðuna og um møguleikarnar hjá næminginum at fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan.
- b) Ynskir næmingur at fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan, letur flokslærarin skúlastjóranum eina tilráðing um, hvussu próvtøkan kann verða skipað.
- c) Grundað á tilmæli flokslærarans og í samráð við tey, ið hava foreldramyndugleikan, og lærararnar í viðkomandi lærugreinum, tekur skúlastjórin avgerð um serligu fyriskipanina. Serlig fyriskipan kann eisini vera grundað á eina námsfrøðiliga-sálarfrøðiliga meting, um næmingur vegna trupulleikar ikki kann fáa próvtøkuúrslit, sum endurspegla hansara fakliga støði. Onnur sernámsfrøðilig meting kann eisini verða nýtt.
- d) Avgerð um próvtøkur eftir serligari fyriskipan skal vera tikin fyri 1. februar fyri próvtøkurnar í mai-juni mánaði sama árið.

# 3. Próvdøming

- a) Próvdømingin skal fylgja somu meginreglum og vera á sama fakliga støði, sum galdandi er fyri hinar næminganar. Próvdómarin skal vera tann sami sum hjá hinum næmingum. Í sambandi við skrivliga próvtøku, har næmingur hevur nýtt ávíst hjálpartól, kann tó verða neyðugt, at lærari við serkunnleika innan økið próvdømir.
- b) Skúlin søkir Mentamálaráðið um at útvega serligar uppgávur til næmingar við serligum tørvi. Umsókn verður send fyri 1. februar til próvtøkurnar í mai-juni mánaði sama árið.

# Próvtøkukunngerðin

- **§ 53.** Skúlastjórin skrivar næmingi, sum ikki megnar fakligu krøvini í einari lærugrein og tí verður frítikin fyri at fara til próvtøku, støðumetingarskjal, sbr. § 9, stk. 5 og § 62, stk. 1.

  *Stk. 2*. Skúlastjórin tekur í samráð við avvarðandi lærara, næmingin og tey, ið hava foreldramyndugleikan, avgerð um, hvat støðumetingarskjalið skal fevna um í mun til úrtøku og avrik næmingsins. Mentamálaráðið ger frymil til støðumetingarskjal.

- **§ 9.** *Stk. 5*. Skúlastjórin tekur í samráð við lærarar floksins, næmingin og tey, ið hava foreldramyndugleikan, avgerð um, at næmingur lutvíst ella heilt kann verða frítikin frá at fara til próvtøku, sbr. § 53. Avgerðin tekur m.a. støði í einum skrivligum tilmæli frá Sernámi ella øðrum serkønum innan sernámsfrøðiliga økið um persónliga og fakliga førleika næmingsins, sbrt. fylgiskjali 1.

# Fylgiskjal 2

## 2. Onnur viðurskifti

- 2.1.Vavið á frítøku.

Skúlastjórin ger av saman við næmingi, teimum, sum hava foreldramyndugleikan, og lærarum í avvarðandi lærugreinum, hvat frítøkan fatar um.

- 2.2. Onnur eftirmeting enn próvtøka.

Støða verður samstundis tikin til, á hvørjum øðrum grundarlagi úrtøkan hjá næminginum verður eftirmett. Eftirmetingin, sum verður í staðin fyri próvtøku, fer fram í próvtøkutíðarskeiðnum.

- 2.3. Prógvið.

Á próvnum verða bara tilskilaðar upplýsingar um frítøku í kravdum próvtøkulærugreinum ella partar av próvtøkulærugreinunum. Verður næmingur frítikin fyri lærugreinar, sum ikki eru kravdar próvtøkulærugreinar, og sum Mentamálaráðið ikki hevur tikið út til próvtøku, verður á próvnum einki tilskilað um frítøku.

# Hvørjar eru avbjóðingarnar og loysnirnar?

- Sjón
- Rørslutarn
- Hugsavning
- Fatanarligt
- Tungumál
- Skúlanoktan
- Tala
- Hoyrn
- Orðblindni

# Prógv

- Vanligt prógv
- Støðumetingarskal
- fráfaringarskjal

Kenneth í Mórugøtu

Fornavn, eftirnavn / *First name, surname*

150199-xxx

P-tal / *Personal ID*

## Kravdar lærugreinir / *Compulsory subjects*

| | Ársmet *Year's marks* | *ECTS* | Próvtøl *Exam marks* | *ECTS* | Sí viðmerkingar / View remarks |
|---|---|---|---|---|---|
| Føroyskt skr. / *Faroese written* | | | | | |
| - Framseting / *Essay* | - | - | - | - | ** |
| - Máluppgáva / *Language ability* | - | - | - | - | ** |
| Føroyskt mnl. / *Faroese oral* | - | - | - | - | ** |
| Danskt skr. / *Danish written* | | | | | |
| - Framseting / *Essay* | - | - | - | - | ** |
| - Máluppgáva / *Language ability* | - | - | - | - | ** |
| Danskt mnl. / *Danish oral* | - | - | - | - | ** |
| Enskt skr. / *English written* | | | | | |
| - Framseting / *Essay* | 7 | C | 4 | D | |
| - Máluppgáva / *Language ability* | 7 | C | 4 | D | |
| Enskt mnl. / *English oral* | 4 | D | 02 | E | |
| Ítróttur / *Gymnastics* | 7 | C | - | - | |
| Kristnikunnleiki og átrúnaður mnl. / *Christianity and religion oral* | 4 | D | - | - | |
| Landalæra mnl. / *Geography oral* | - | - | - | - | ** |
| Lívfrøði mnl. / *Biology oral* | 4 | D | 4 | D | |
| Støddfrøði skr. / *Mathematics written* | | | | | |
| - Greiðslurokning / *Mathematics, problem solving* | - | - | - | - | ** |
| - Fimisrokning / *Mathematics, dexterity* | - | - | - | - | ** |
| Søga og samtíð mnl. / *Modern history oral* | 02 | E | 4 | D | |

## Vallærugreinir / *Optional subjects*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Motorlæra mnl. / *oral* | 10 | B | - | - | |

** merkir viðmerking á síðu 2.

| | |
|---|---|
| *Evnisarbeiði / Project* | ** |
| *Arbeiðslag / ...* | ** |
| *Sosialir førleikar / ...* | ** |

**Kenneth í Mórugøtu**

Fornavn, eftirnavn / *First name, surname*

**150199-xxx**

P-tal / *Personal ID*

## Kravdar lærugreinir / *Compulsory subjects*

| | Viðmerkingar / Remarks |
|---|---|
| Føroyskt / *Faroese* | Dugir at lesa, skilja og viðgera lættan tekst. Dugir at leita upp og ogna sær viðkomandi vitan á bókasøvnum, í bókmentum, handbókum og á internetinum. At nýta orðabókur, rættstavara og leitiskipanir á teldu. |
| Danskt / *Danish* | Dugir at stava og skriva løtt orð. Megnar at lesa lættir tekstir. Skriva lættir tekstir við hjálp av forriti. |
| Landalæra / *Geography* | Kenneth ætlar at vera sjálvlesandi komandi skúlaár í landalæru. |
| Støddfrøði / *Mathematics* | Leggja saman og draga frá. Dugir klokkuna. Dugir raðfylgju. Kennir hugtøkini 'tað dupulta' og 'helvtina.' |

## Evnisarbeiði / *Project*

Høvuðsevni: Sólskipanin. Partsevni: Sólarmyrking. Kenneth valdi evnið í samband við sólarmyrkingina í mars í ár. Hann hevur skrivað eina góða og áhugaverda uppgávu - og arbeiðslagið hjá honum hevur verið fyrimyndarligt.

## Arbeiðslag / ...

Kenneth hevur alt árið mott hugagóður í skúla. Har áhugin fyri lærugreinini er stórur, arbeiðir Kenneth ágrýtin og hugagóður - og nógv kemur eisini burturúr. Kenneth motir væl upp - og hann fyrireikar seg eisini heima, tá tað snýr seg um hansara yndislærugreinir.

## Sosialir førleikar / ...

Kenneth trívist væl saman við sínum floksfelagum - og er eisini væl lýddur av teimum. Hann hevur tvey tey seinastu árini verið hollur stuðul á spælliðnum - og hetta árið eisini verið umboð í næmingaráðnum.

# Tilfar

- Heimasíðan hjá Próvstovuni: www.provstovan.fo
  - Vegleiðing til próvtøku eftir serligari fyriskipan
  - Vegleiðing til landsroyndina í sambandi við stuðul til næmingar við serligum tørvi
  - Vegleiðingar til prógv, støðumetingarskjal og fráfaringarskjal
- Lógarverk www.logir.fo
  - Próvtøkukunngerðin nr. 15 frá 2013
  - Fólkaskúlalógin nr. 125 frá 1997